**Álit**

**í**

**ungdómstingsmáli nr. 6/2012**: **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu (prutl)**

9.a flokkur í Vestmanna skúla hevur lagt málið fram hin 6. februar 2012, og eftir 1. viðgerð 6. februar 2012 er tað beint í Vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 6. februar 2012. Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Ráðið fyri Ferðslutrygd. Nevndin fekk á fundinum handað skjal við viðmerkingum frá Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

**Ein samd nevnd** tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Í lógaruppskotinum verður skotið upp, at loyvt verður skutarum og prutlum at koyra 50 km/t í staðin fyri tey 30 km/t, sum er hægst loyvda ferð í dag. Á fundi við Ráðið fyri Ferðslutrygd spurdi Vinnunevndin um ráðið hevði hagtøl fyri, hvussu nógv doyggja í ferðsluni á prutli. Ráðið upplýsti, at 40 eru deyð í ferðsluni frá 1997-2007, av hesum eru 20 frá 15-24 ár. 29 av teimum deyðu eru menn og 11 kvinnur.

Uppskotstillararnir føra fram, at flestu óhappini henda, tí at bilarnir kroysta prutlini inn ímóti vegkantinum. Á fundi við Ráðið fyri Ferðslutrygd spurdi nevndin, um hald er í hesum pástandi. Ráðið fyri Ferðslutrygd upplýsti, at tað er ein myta, at flestu óhapp henda, tí at bilarnir kroysta prutlini inn ímóti vegkantinum. Óhappini henda, av tí at tey ungu ov ofta ikki hava hjálm, tá ið tey koyra prutl, og møguliga av tí, at ov lítil frálæra er til tey ungu, áðrenn tey fáa koyrikort. Ráðið fyri Ferðslutrygd mælti staðiliga frá, at ferðin varð hækkað úr 30 km/t til 50 km/t. Ráðið vísti á, at um ein persónur koyrir eitt prutl uttan hjálm við 50 km/t og renur á, er tað at meta sum, at persónurin dettur av 3. hædd av einum húsum við høvdinum fremst. Um ein persónur hinvegin koyrir prutl uttan hjálm við 30 km/t og renur á, svarar tað til, at viðkomandi dettur av 1. hædd á einum húsum við høvdinum fremst. Tað er sostatt ikki nøktandi at koyra prutl uttan hjálm við 30 km/t, men tað er frægari enn at koyra 50 km/t. Ráðið metti tí, at tað fór at hava ógvusligar avleiðingar fyri ferðslutrygdina, um ferðin varð sett frá 30 km/t til 50 km/t.

Vinnunevndin er samd við sjónarmiðunum hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd í hesum málinum. Ein samd nevnd mælir tí Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 7. februar 2012**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan í Dímun Højgaard<br>Formaður | Teitur Horn Baldvinsson<br>Næstformaður | Tóra Á Løgmansbø Bláhamar |

Hanus í Horni Nielsen | Jákup Poulsen | Eyðrið Mortansdóttir

Marita Thorsteinsson | Kristina Mouritsen | Jóanis Albert Nielsen

Hervør Pálsdóttir